

# Nógv stolið fýrverk

Fýrverk er vorðið virðismikið tjóvagóðs, og sambært felagnum hjá teimum donsku fýrverkssølunum er tað ikki bara tað ólógliga fýrverkið, sum verður stolið og síðani selt. Tvørturímóti er líka ofta talan um lógligt fýrverk, sum tjóvarnir hava tikið úr goymslunum hjá handlunum. Men marknaðurin í desember er stórur, og fleiri tjóvar fella fyri freistingini at stjala og selja ólógligt fýrverk, sigur DR og nevnir sum dømi, at so seint sum sunnudagin vórðu 1.000 lívshættisligar krysantiumbumbur stolnar úr einari bingju í Haderslev.



*Klaksvík hevur fingið ein snotisligan bygning afturat*

*Mynd: Jan Müller*

## FAKTA um bygningin

Bygningurin hjá Eik Banka hevur knappliga 600 m2 gólvvídd í tveimum hæddir, hann er gjørdur av beton og klæddur við skifer uttan.

Árni Winther arkitektar hava teknað og projekterað bygningin. Høvuðsentreprisuna hevur byggifelagið Kanjon havt. Sofus M. Jacobsen, ráðgevandi verkfrøðingar projekterað hvs partin og Victor á Lakjuni hevur gjørt arbeiðið. Ráðgevandi verkfrøðingur Sámal Johannesen, hevur rokna berandi konstruktiónir. KJ-elráð hevur projekterað el-arbeiðið, og El-in hevur gjørt arbeiðið. LM-electric hevur gjørt trygdarinstallatiónirnar. Málarameistari Magni Jacobsen hevur gjørt málara-arbeiðið. Tilhús v/ Magnus Gregersen, hevur leverað og sett upp glasfasadurnar og innhurðar. Jan Elleby Andersen, múrarameistari, hevur gjørt flisa- og múraraarbeiðið, og Eskild Hansen hevur lagt gólvið o.a.

Eftirlit Dánjal Pauli Poulsen og Kári Danielsen, byggifrøðingar hjá Eik Banka, havt saman við Sylvan Poulsen frá Árna Winther Arkitektum.



*Klaksvíkar Sjónleikarafelag framførdi brot úr Emil frá Lønnibergi og sangkórið Suð sang til hátíðarløtuna*

*Mynd: Jan Müller*

hava tey eina greiða uppgávu:

- Okkara visión er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum. Hetta royna vit at røkka við at veita ein framúr góða ráðgeving um fíggjartænastur á ein tryggum grundarlagi, har málið er at geva kundunum eitt gott avgerðargrundarlag fyri at nøkta sín tørv, segði Bjarni Olsen.



*Smílandi Eik-andlit. Martin Restorff og Oluffa Hammer*

*Mynd: Jan Müller*

